# Tað snýr seg ikki um lekan

*Finnur Helmsdal, tingmaður*



Jógvan við Keldu, løgtingsmaður fyri Fólkaflokkin í Norðoyggjum, skrivar í bløðunum um avgerðina at flyta Strandferðsluna til Suðuroyar. Hann sigur seg hava broytt meining ella, at hann nú hevur hugsað seg væl um. Niðurstøða hansara er, at einki galið er við hvørki avgerðini ella mannagongdini, einasti trupulleikin í málinum er, at onkur hevur likið tíðindini.

Skal geva Jógvani rætt í tí, at tað er ikki heppið, um embætisfólk eru illoyal mótvegis politikarunum m.a. við at leka. Og hevur onkur gjørt seg sekan í hesum, eigur tað at fáa avleiðingar so ella so. Men góði Jógvan, lekin er so avgjørt ikki ein avgerandi trupulleiki í hesum sera óhepna máli. Trupulleikin er, at framferðin í hesum málinum er enn eitt skúladømi um, hvussu lítla virðing politiska valdið í veruleikanum hevur fyri almennu starvsfólkunum. Formaðurin í Starvsmannafelagnum, Gunnleivur Dalsgarð, tók ógvuliga rívan til, tá hann lýsti hugburð landsstýrissins mótvegis almennum starvsfólkum, og eg tori at siga, at Gunnleivur er ikki langt av leið.

Framferðin í málinum um flytingina av Strandferðsluni átti at lopið ein hvøkk á okkum øll, eisini Jógvan við Keldu. Tí taka vit okkum ikki saman og virða bæði avtalur, mannagongdir og ikki minst fólkini, so enda vit sum tann afturúr siglda bananrepublikkin, sum nógv hava frægd av at kalla okkum. Tíðin er langt síðan farin frá primitivum politikarum, sum bara megna eitt í einum framkomnum samfelag, nevniliga at syndra og reka fólk av garði. Sleppur karrráði fólkflokshugburðurin framhaldandi at dominera og køva hinar flokkarnar, so verða tað ikki bara tey best lærdu, sum flýggja.

Sjálvandi skulu vit øll liva, og sjálvsagt skulu almenn arbeiðspláss til Suðuroyar eisini. Men latið okkum sleppa hasum primitiva og barbariska framferðarháttinum. Latið okkum vísa bæði samfelag og fólki ta virðing, sum tey hava uppiborið. Tað er væl skiljandi, at ávísir brenna eftir at verða valdir, men tað heimilar ikki at gera tað, sum landsstýrismaðurin gjørdi í Strandferðslumálinum. Høvuðstrupulleikin var og er ikki lekin, Jógvan. Høvuðstrupulleikin er ein heilt annar, og tað veit tú eisini væl.

### Kreppuhjálp

Amerikumenn tosa um eitt fyribrygdi, sum teir rópa yvirviðgerð. Tað er heiligvágídnaðurin, sum lokkar fólk at taka í yvirmát av ofta óneyðugum heiligvági, hetta fyri at vinna sum mest av peningi. Privatu sjúkrahúsini og læknarnir lokka somuleiðis fólk í ofta óneyðugar men dýrar viðgerðir. Vit kunnu eisini siga, at Útvarpið ovurviðgjørdi málið um Strandferðsluna, tá tíðindafólk fóru at tosa um kreppuhjálp til starvsfólkini á Strandferðsluni. Ikki tí, starvsfólk høvdu helst tørv á stuðli í samband við skakandi boðini, sum kollveltu tilveruna hjá fleiri. Men sæð í mun til støðuna í Suðuroynni, har fleiri hundrað fólk hava havt ilt við at fáa mat í munnin vegna arbeiðsloysi í langa tíð. Har fólk í hópatali hava flýggja undan vónloysinum. Nær hevur Útvarpið ella nakar annar tosað um kreppuhjálp til teirra?

Men aftur hinvegin, so rættvísger neyðstøða í Suðuroynni ikki, at landsstýrismaður í atkvøðutrega og uttan nakra ávaring ella ætlan annars av nøkrum slagi, bara hálar teppið undan dugnaligum og trúgvum starvsfólkum, sum eisini hava hús og heim at forsvara. Den går ikke, Jógvan við Keldu.

# Fiskivinnuskúlin – góður og gagnligur

**HEÐIN SAMUELSEN**



Eg havi í nógv ár undirmett Fiskivinnuskúlan í Vestmanna. Játtaði tó ivingarsamur fyri knøppum ári síðani at stuðla smávegis, fyribils. Og tað havi eg ikki angra. Tí betri skúla skal ein leita leingi eftir, hóast hann hevur síni lýti.

At eg havi undirmett skúlan, man neyvan gera til ella frá. Verri er, at myndugleikar, foreldur at ungdómi í miðnámsskúlaaldri og tey ungu sjálvi eisini tykjast at undirmeta hann. Í hvussu er, hevur nemingatilgongdin higartil verið í minna lagi við tað, at hann skal eitast at tæna okkara høvuðsvinnu. Og Løgting og skúlamyndugleikar hava vist ov leingi givið skúlanum ov lítlan ans. Og tað hava hvørki nemingar, skúli ella samfelag uppiborið.

Tað er hetta eg vil royna at gera vart við, áðrenn farið verður undir nýggjan tein, t. e. nýtt skúlaár, nýbygging og nýggjar útbúgvingar. Høvi býðst umframt at heita á skúlamyndugleikarnar at taka seg saman viðvíkjandi onkrum týdningarmiklum málum.

Eftir øllum at døma stavar tað mesta av undirmetingini frá, at skúlin liggur í Vestmanna, at hann er lítil, ov lítlari profilering, og – ikki minst – navninum: Fiskivinnuskúlin.

Trý tey seinast nevndu viðurskifti kann okkurt gerast við, og verður tað eisini gjørt, men neyvan gerst nakað í bræði við leguna.

At hann á sinni varð lagdur í Vestmanna, var eftir mínum tykki ein skeiv, lokalpolitisk landstýrismannaavgerð. Men vit mugu nú einaferð fyrihalda okkum til veruleikan: Skúlin er har, farið verður skjótt undir nýbygging, nýmótansgerð og víðkan, alt meðan einki røkist fyri, at miðnámsskúlar finna saman í deplar, t.d. í Havn, Hovi og Kambsdali/Klaksvík, sum av námsfrøðiligum, synergetiskum og munaligum orsøkum harðliga er fyri neyðini, og sum nú er einasta argument, sum kundi tala fyri, at Fiskivinnuskúlin varð fluttur.

At eg ikki taki gamla argumentið við um, at ein Fiskivinnuskúli eigur at liggja í námind av, har mest fiskivinna er, kemst av, at talan er í lítlan mun um beinleiðis fiskaarbeiði, og at prógv frá hesum skúla kvalifiserar til so nógv annað enn størv "bara" í fiskivinnuni. Fiskivinna er bara ein (høvuðs) lærugrein av nógvum øðrum praktiskum og teoretiskum. Men kortini er hon sera týdningarmikil grein, tí at – og aftur her mugu vit fyrihalda okkum til veruleikan – fiskivinna er okkara høvuðsvinna, og verður verðandi tað í langa tíð frameftir.

Talan er heldur – og verður tað í nógv størri mun í framtíðini – um ein matvøruídnaðarskúla, sum alsamt størri og størri tørvur verður á, so hvørt sum áhugi og góðskukrøv til matvørur vaksa. Og talan er um ein breitt vinnu"málrættaðan" skúla, sum gevur nemingunum so mikið av vinnuførleika, at tey flestu seinni kunnu royna seg beinleiðis í ymiskum funktiónum á virkjum, og onnur sum leiðarar, t.d. sum verkførarar ella virkiseigarar.

Og samstundis gevur skúlin, eins og aðrir miðnámsskúlar, lestrarførleika, t.e. grundarlag fyri at fara undir hægri framhaldslestur. Eisini er hann lærlingaskúli.

Ein niðurstøða hjá skúlaleiðsluni av hesum er, at skúlin eigur at fáa navnabroyting. Uppskot eru vælkomin, haldi eg meg hava hoyrt.

Fyrsta áheitan mín til myndugleikarnar er tí: Bindið um heilan fingur við at fara undir at nøkta alsamt vaksandi førleikatørvin viðvíkjandi matvøruframleiðslu og –dygd sum skjótast. Og gagnnýtið Fiskivinnuskúlan í stóran mun til hetta við at vaksa um hann, men gerið tað kortini hóvliga og við atliti at øðrum skúlaformum. Valla er tað nakar, sum ivast í tí samfelagsgagnliga at gera so.

Næsta áheitan mín er: Gevið øllum miðnámsskúlum møguleika at undirvísa til og við bachelorstig. Hetta vegna at kunna skapa nakrar meiri heilskapaðar útbúgvingar, sergreiningar og at menna lærarar og eggja teimum til. Alt gott at siga um ráðandi hugburðin í Mentamálaráðnum, eftir hvørjum Fróðskaparsetrið eigur at taka sær av øllum, sum er hægri enn miðnám, men mark má vera fyri hvussu leingi, ið vit skulu bíða. Líkt er til, at vit bíða eftir Godot!?. Danir siga: "Mens græsset gror, dør horsemor". Tað er júst hetta, sum hendir í føroysku skúlaverðini.

Triðja áheitan mín er: Fái nú eina samskipaða bygging í lag úti við Marknagilsvegin í Havn. Eisini her má mark vera fyri, hvussu leingi myndugleikar okkara lata sær lynda at verða gíslar hjá nøkrum einstaklingum, sum eftir øllum at døma bara hugsa um egnu vælferð. T. d. hevur Tekniski Skúlin í Havn bíðað eftir hóskandi umstøðum í uml. 40 ár til stórt ógagn fyri vinnulívið. Hetta hevur so sanniliga eisini nakað við Fiskivinnuskúlan í Vestmanna at gera, tí at skúlarnir verða "spældir út" móti hvørjum øðrum, hvat ið forðar fyri natúrligari kapping teirra millum og tí fyri menning.

Fyri ikki at gerast alt ov drúgvur, verður innihaldið í undirvísing skúlans ikki umrøtt. Um tað kann lesast á heimasíðu skúlans www. fiskvest. fo og í upplýsingartilfari, sum m.a. fæst frá skúlanum.

Men eg kundi hugsað mær at givið lesaranum innlit í, hvussu ið eg upplivi Fiskivinnuskúlan sum fyribilslærari, ið hevur nokkso drúgvar royndir frá nógvum skúlasløgum og nokkso drúgvar praktiskar royndir og royndir í leiðslu:

Fiskivinnuskúlin skilir seg út frá øðrum skúlum við at hava eina sera lítla fyrisiting (skúlastjóri, praktikkleiðari og lestrarvegleiðari), sera ópraktiskar hølisumstøður (hýsing í fýra húsum) og við, at so at siga allir lærarar eru tímalærarar, sum koma og fara, uttan at hava natúrligan møguleika at tosa og vera saman.

Hetta talar fyri, at skúlin átti at verið lítið effektivur og óunniligur hjá nemingum og lærarum at virka í. Men tað er tvørturímóti. Hann virkar væl. Eg haldi orsøkirnar vera hesar:

Leiðslan er suveren. Stjórin er m.a. arbeiðssamur, gløggur, praktiskur, visionerur, fyrikomandi, men dugir samstundis at vísa fastleika.

Á nógvum skúlum – og øðrum arbeiðsplássum fyri tað – miskilja lærarar og starvsfólk, serliga sovorðin, sum ongantíð hava pissa í saltan sjógv, t.e. ikki hava vinnulívsroyndir, teirra leiklut, og blanda saman ráðveitingarrætt og –skyldu við avgerðarrætt. Og nógva staðni hava fólk, sum fáa litið upp í hendur at taka sær av ávísum funtiónum, lyndi til at suboptimera og gera álitisstarvið til eitt slag av stati í statinum ella smákongaríki, sum tikið verður til, ofta við trivnaðarforðandi og korrumperandi avleiðingum.

Leysa tilknýtið hjá lærarunum og lítla, men munadygga fyrisitingin ger, at her fær skúlastjórin loyvi til at vera stjóri, og tað er ikki gingið honum til høvdið. Hann sleppur at spæla uppá allar leiðsluformastreingir, sum skiftandi umstøður krevja, og hann er – og tað hevur ikki minst at týða – sjónligur. Hann letur øll – eisini nemingar – koma til orðanna. Hann er opin fyri øllum og fremur neyðugt (og bara neyðugt) eftirlit, sjónliga. Har er við øðrum orðum ikki talan um eina leiðslu, sum búrar seg inni í einum teldukliva, sum fremur eftirlit eftir "big brother watch you" – háttinum, og annars næstan bara kommunikerar við av og á at glaða, oftani við nógvum royki men ongari grind, men heldur líkt pávavali í Rom.

At hini bæði álitisfólkini eru sera væl at sær komin og avhildin, ger bara støðuna uppaftur betri.

Ein annar fyrimunur er, so løgið tað kann ljóða, tímalæraraskipanin. Í prinsippinum tarnar tað sjálvandi samskifti, at fólk ikki eru á staðnum og skúlin spjaddur, men við First Class netsamskiftisskipanini, við at skúlin við stuttum millumbilum opið kunnar um støðuna, og við at skúlin javnan skipar fyri fundum, skeiðum og ymsum felagstiltøkum, bæði fyri nemingum og lærarum, gongur alt sum eftir ánni.

Lærararnir eru valdir við hepnari hond: Mest serfrøðingar við drúgvum arbeiðsroyndum, sum tykjast at hava viðføddar gávur at undirvísa. Teir sýnast ikki at verða fongdir við herviligu sóttini **í heilum** at importera og implementera nýggjar og stressandi undirvísingarhættir, sum alt ov oftani verður gjørt fyri at dekka yvir ómegd. Umframt at dáma ungdómin og at undirvísa nýta teir heldur fakligt innlit, royndir, vitan, síni refleksivu evnir og karismatisku persónsmensku at motivera nemingarnar við. Og nemingarnir eru motiveraðir – ið hvussu er ein stórur meiriluti.

Og teir mugu arbeiða hart. "Nihil sine labore" æt eitt sigarslag, sum fyri nógvum árum síðani fekst hjá Oskari Arge, sála. Tað merkir: Einki úrslit uttan arbeiði.

Eisini virkar tað sum um tímalæraraskipanin forðar fyri óhepnum, men rættiliga vanligum menniskjaligum yndisítrivum so sum at øvunda, fara við slatri, snikja og bakbíta. Og fyri fyribrigdum sum at tosa niður til nemingar resp. at nýta tey ungu sum takksom offur fyri frelsu frá fákunnu, synd og øðrum dárskapi. Á Fiskivinnuskúlanum verður eingin tvingaður, men heldur tileggjað(ur).

Truplu hølis- og samskiftisumstøðurnar og kostnaðarspillið, sum eisini stendst av at skúlin noyðist at hava somu arbeiðsamboð í øllum fýra skúlahúsunum, amboð, sum annars kundu verið felags, talar so sanniliga eisini fyri at nýggjur skúli verður bygdur.

Men, sum sagt, kunnu vansar fylgja við, um ikki rætt verður atborið. Men hesir vansar mugu vigast upp ímóti tí stóra samfelagsgagni, ein rættiligur matvøruskúli kann hava við sær. Hjá mær er eingin ivi um, hvat ið rættast er at gera her og nú, og ynski eg skúlanum blíðan byr á leiðini. Samstundis sendi eg blíðar tankar til Gunvør Hoydal, sum stríddist so nógv fyri at fáa Fiskivinnuskúla í lag og fyri at gera fiskivinnu til lærugrein á fleiri skúlum. Og hví ikki taka við í hesa takkarheilsan Jógvan Durhuus, sum fekk skúlan til Vestmanna!